## UTTAN ÚR HEIMI

### Taka seg aftur

Sýriska stjórnin sigur seg nú vera til reiðar at taka teir 14.000 sýrisku hermenninar úr grannalandinum Libanon.

Seinastu dagarnar hava fleiri túsund libanar gingið kravgongu í Beirut við kravi um, at teir sýrisku hermenninir skulu av landinum. Tað sama hevur USA kravt, og fyrrakvøldið segði sýriski forsetin, Bashar al-Assad, at Sýrialand fer at gera eftir áheitanini. Hann segði, at hermenninir verða tiknir heim skjótt og kanska longu um nakrar mánaðir, sum hann orðførdi seg.

Sýrialand hevur havt hermenn í Libanon í mong ár og hevur havt stóra ávirkan á ta politisku skipanina har. Andstøðan í Libanon vil vera við, at tað var sýriska fregnartænastan, sum myrdi libanska andstøðuleiðaran í síðstu viku, men tað hevur stjórnin í Damaskus avsannað.

### Eingi prógv ímóti Jackson

Verjin hjá poppstjørnuni Michael Jackson krevur, at ákæruvaldið í Kalifornia skal sleppa ákærunum um, at tann heimskendi tónleikarin skal hava misnýtt ein 13 ára gamlan drong kynsliga.

Rættarmálið byrjaði mánakvøldið, og verjin, Thomas Messereau, vísti ákærunum aftur. Hann vísti á, at løgreglan fann eingi DNA-spor frá tí 13 ára gamla dronginum, tá hon kannaði kamarið hjá Michael Jackson. Verjin segði, at einki hald er í ákærunum, og at tað er mamma drongin, sum hevur íspunnið søguna fyri at fáa pengar burturúr. Ákærin, Thomas Sneddon, helt uppá, at Michael Jackson er sekur, og hann legði afturat, at tað fer ákæruvaldið at prógva.

Áhugin fyri rættarmálinum ímóti Michael Jackson er sera stórur. Ikki færri enn 1500 tíðindafólk úr øllum heiminum eru komin at fylgja við tí.

### Tjóðbankin ivast

OECD og donsku vísmenninir hava ávarað um, at metingin hjá stjórnini um 60.000 fleiri arbeiðspláss innan 2010 fer ikki at halda uttan so, at umfatandi nýskipanir verða framdar. Nú sigur danski Tjóðbankin tað sama.

Í einari nýggjari frágreiðing sigur Tjóðbankin, at ein ávís framgongd er á arbeiðsmarknaðinum, men skal stjórnin røkka sínum máli, mugu tiltøk setast í verk. Varastjórin í Tjóðbankanum, Anders Møller Christensen, sigur við Politiken, at tað er ikki nóg mikið at seta sítt álit á ta búskaparligu framgongdina, tí tað ræður eisini um at tryggja arbeiðspláss, tá búskapurin gongur niðureftir, sigur hann.

Tjóðbankin hevur sostatt somu hugsan sum teir donsku vísmenninir og OECD. Higartil hevur stjórnin hildið uppá, at hennara metingar fara at halda, men tað var, áðrenn Tjóðbankin segði sína hugsan.

### Hilde góðar møguleikar

Norska stjórnin roynir av øllumm alvi at bera so í bandi, at Hilde Frafjord Johnson, menningarmálaráðharri, kan fáa starvið sum leiðari í menningargrunninum hjá ST, UNDP.

Tað var stjórnin sjálv, sum stillaði Hilde Frafjord Johnsen upp til starvið, og tað bleiv gjørt í einum brævi, sum Kjell Magne Bondevik, forsætisráðharri, skrivaði Kofi Annan, ST-aðalskrivara. Síðani hevur uttanríkisráðið í Oslo fingið boð um at virka fyri, at menningarmálaráðharrin fær starvið.

Hilde Frafjord Johnsen er ikki tað einasta evnið til leiðarastarvið í UNDP. Bretska stjórnin hevur skotið upp, at Valerie Amos fær starvið. Hon er upprunaliga ættað úr Ghana og hevur fyrr verið bretskur menningarmálaráðharri. Kortini verður hildið, at norska evnið hevur betri møguleikar. Tað kemst av, at verandi leiðarin í UNDP, Marl Malcolm Brown, er breti, og tað verður hildið óhugsandi, at ST fer at lata ein breta loysa hann av.

# Krígsbrotsmaður valdur til afghanskan herovasta

**Tað hevur vakt stóran ans, at afghanski forsetin, Hamid Karzai, hevur sett fyrrverandi krígsharran Rashid Dostum til ovasta fyri afghanska herinum**

AFGHANISTAN
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Í umleið tjúgu ár stýrdi generalurin Rashid Dostum tí norðara partinum av Afghanistan, og hann gjørdist skjótt kendur sum ein sera harðrendur krígsharri, sum bæði píndi og myrdi sínar mótstøðumenn.

Nú hevur Hamid Karzai, forseti, tilnevnt fyrrverandi krígsharran ovasta fyri tí nýggja afghanska stjórnarherinum. Tá Reuter-tíðindastovan spurdi talsmann forsetans um krígvbrotsverkini hjá fyrrverandi krígsharranum, svaraði hann stutt:

– Tað er eitt heilt annað mál, og eg haldi, at í framtíðini eiga allir afghanar at fáa høvi at gera sína skyldu.



*Hóast hann alment er kendur sum herviligur krígsbrotsmaður er Rashid Dostum nú settur sum ovasti fyri afghanska stjórnarherinum*

*Mynd: Reuters*

Rashid Dostum stillaði upp ímóti Hamid Karzai á forsetavalinum, men tapti. Kortini hevur hann stórt vald, og Karzai hevur sett hann til herovasta fyri at sleppa undan at fáa hann ímóti sær.

Avgerð forsetans er djørv, tí Rashid Dostum er lagdur undir at hava framt ein hóp av krígsbrotsverkum í áttati- og nítiárunum. Tað vóru eisini hansara hermenn, sum kvaldu fleiri hundrað talibanar við at steingja teir inni í lufttøttum bingjum undir krígnum í 2001.

Undir valstríðnum upp undir afghanska forsetavalið almannakunngjørdi amerikanski felagsskapurin Afghanistan Justice Watch eina frágreiðing um avrikini hjá Rashid Dostum í árunum frá 1978 til 2001. Longu tá gitti felagsskapurin, at Dostum og aðrir krígsharrar fóru at fáa leiðandi størv í tí nýggja afghanska stjórnarherinum, og at USA fór at venda tað blinda eygað til. Sambært AJW vil USA heldur hava gagn av krígsharrunum í bardaganum ímóti yvirgangi enn at kanna teirra krígsbrotsverk.

# Krevja »Kursk«-vanlukkuna kannaða umaftur

**Avvarðandi hjá teimum, sum doyðu við russiska kavbátinum "Kursk", krevja, at vanlukkan verður kannað eina ferð afturat**

VANLUKKA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Avvarðandi hjá teimum, sum doyðu, tá russiski kavbáturin "Kursk" sakk í Barentshavinum í august í 2000, halda seg framvegis ikki hava fingið allan sannleikan um vanlukkuna.

Í fjør havnaði russiski hægstirættur einum kravi frá teimum avvarandi um at kanna vanlukkuna av nýggjum. Tey gjørdu av at leggja málið fyri tann evropeiska mannarættindadómstólin, men nú er tað málið tikið aftur. Tað hendir, eftir at Vladimir Putin, forseti, hevur játtað at koma á fund við umboð fyri tey avvarandi fyri at taka endaliga støðu til, um vanlukkan skal kannast umaftur.



*Tey avvarðandi vilja vera við, at nakrir av manningini á Kursk vóru á lívi minst tvey samdøgur, eftir at kavbáturin var sokkin*

*Mynd: Reuters*

Vanlukkan við "Kursk" kravdi 118 mannaliv. Myndugleikarnir komu til ta niðurstøðu, at kavbáturin sakk av einari spreinging, og at tað gingu átta tímar, til teir seinastu av manningini doyðu. Sakførarin hjá teimum avvarandi, Boris Kusnetsov, vil kortini vera við, at 23 av manningini vóru á lívi minst tvey samdøgur aftan á spreingingina. Tað hevði tí borið til at bjarga teimum, um rætt varð atborið, sigur hann.

– Gitingin um, at eingin møguleiki var at bjarga monnunum í tí níggjunda rúminum, er tað grovasta mistakið í teirri almennu frágreiðingini, skrivaði verjin í einum brævi til Putin, forseta herfyri.